# Útgangsstøðið er hitt sama

**– Hesin dysturin gevur bara trý stig eins og allir aðrir, og tí eru vit í útgangsstøðnum í somu støðu sum vant, heldur Henrik Larsen, sum tó sjálvandi ásannar, at talan er um eina sera stóra avbjóðing hjá føroyska liðnum**

*– Hóast vit als ikki fingu okkara spæl at koyra, so halda vit litavum frá at skapa so øgiliga nógv, og tann partin av spælinum eiga vit at halda fast í mikudagin, sigur Henrik Larsen*

TÝSKLAND-FØROYAR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*

**HANNOVER:** Spenningurin er sjálvsagt stórur í føroysku landsliðsleguni, nú liðið skal fyrireika seg størstu avbjóðinga í 12 ára longu søguni hjá føroyskum fótbólti í altjóða høpi.

Týskland er við sínum trimum heimsmeistaraheitum eitt av veruligu stórveldunum í altjóða fótbólti, og fyri bara fýra mánaðum síðani staðfestu teir hesa støðu, tá teir vunnu silvur í HM-kappingini.

Tí er tað sjálvsagt ein sera stór avbjóðing hjá Henrik Larsen og hansara monnum, men sjálvur royndir landsliðsvenjarin tó at taka hesa uppgávu, sum ein og hvønn annan landsdyst.

– Í útgangsstøðinum er talan jú um ein vanligan dyst. Vit fáa framvegis bara trý stig, um vit vinna, og tað er so tað, sum vit mugu fyrihalda okkum til.

– Men sjálvsagt er hetta ein stór avbjóðing. Týskland telist jú millum sterkastu tjóðirnar í heiminum, og vit skulu veruliga spíla okkum út, um vit skulu gera nakað sum helst við teir, og tað mugu vit so royna.

Spurdur, um tað á nakran hátt hevur órógva føroysku fyrireikingarnar, at áhugin um dystin tykist vera somikið stórur, sigur venjarin, at tað heldur hann ikki.

– Sjálvandi eru fjølmiðlarnir kanska fleiri í tali, men fyri tað mesta er áhugin hjá teimum savnaður kring týska liðið, og hvussu teir fara at gera, so vónandi er tað nakað, sum vit kunnu gera okkum dælt av.

Vil tað siga, at tú roknar við, at týskarar undirmeta Føroyar, og at hetta kann gerast ein fyrimunur?

– Nei. Eg rokni ikki við tí, men tað vil eg vóna, at teir gera, er svarið við einum av skeivu smílunum hjá Henrik Larsen.





*Henrik Larsen heldur ikki, at tað á nakran hátt hevur órógva føroysku fyrireikingarnar, at áhugin um dystin tykist vera somikið stórur.*

### Var ikki so galið

Um sjálvar fyrireikingar, nú úrslitið í Litava ikki var heilt eftir vild, sigur Henrik Larsen, at tað hóast alt vóru nakrir lutir frá tí dystinum, sum leikararnir skulu taka við mikudagin.

– Vit spældu sjálvandi ikki so væl í fyrra hálvleiki, men eftir at hava sæð dystin umaftur á sjónbandi, so var tað kanska ikki heilt so galið kortini. Her hugsi eg serliga um verjupartin, tí hóast vit als ikki fingu okkara spæl at koyra, so halda vit litavum frá at skapa so øgiliga nógv. Teir fáa eitt láturliga bíligt brotsspark og so eitt mál, sum er tjúkt off-side. Umframt tað, so høvdu teir ikki so nógvar møguleikar, tí vit fingu hildið teimum frá teimum heilt stóru møguleikunum. Teir brúktu eina øgiliga orku fyri at halda trýstið á okkum, og at enda sást eisini, at teir vóru møddir av hesum, og tað sigur í øllum førum, at kropsliga eru vit nóg væl fyri.

– Setningurin hesa ferð verður sostatt at halda fast við tann partin av spælinum, sum riggaði seinast, og fáa vit so eisini spælið hjá okkum at hanga saman frameftir vøllinum, so kann tað væl vera, at vit koma at geva týskarunum mótstøðu.

# Íslendska landsliðið skert

ÍSLAND-LITAVA
*Hilmar Jan Hansen*

Hin dysturin í bólki 5 í kvøld verður spældur á Laugardalsvøllinum í Reykjavík, har íslendingar taka móti litavum.

Íslendska landsliðið er tó ikki heilt so væl mannað, sum annars var væntandi, tí mánadagin gav ein av royndastu spælarunum, Lárus Orri Sigurðsson, avboð til dystin.

Hann sendi út eitt tíðindaskriv, har hann gevur avboð, tí hann hevur brotið reglurnar, sum allir landsliðsspælarar hava at halda seg til. Sum skilst, endaði hann á vertshúsið leygarkvøldið, eftir at Ísland á heimavølli hevði tapt 0-2 móti Skotlandi.

Lárus Orri Sigurðsson, sum í enskum fótbólti hevur spælt við bæði Stoke og West Bromwich Albion, telist við sínum næst 40 landsdystum millum teir royndastu, íslendski landsliðsvenjarin Atli Eðvaldsson hevur at taka av.

Men gjørd gerð fær onga vend. - Nú vóni eg bara, at landsliðið fær frið og stundir at fyrireika seg til dystin móti Litava, segði Lárus Orri Sigurðsson í tíðindaskrivinum, hann sendi út mánadagin.

Í hansara stað er Ólaf Örn Bjarnason úr Grindavík úttikin til liðið, sum í kvøld skal royna at útvega íslendingum teirra fyrstu stig í hesi EM-undankappingini.

Fimta liðið í okkara bólki, Skotland, skuldi í gjárkvøldið í Edinburgh spæla venjingardyst móti Kanada. Har var væntandi, at landsliðsvenjarin Berti Vogts fór at gera onkrar broytingar í mun til Íslandsdystin, ið fyribils hevur vent skotsku lagnuni.

Onkrir spælarar eru skaddir, aðrir móðir, og so verður annars hildið, at Vogts í hesum venjingardystinum vildi sleppa at royna aðrar, ið ikki hava verið so nógv á skotska landsliðnum fyrr. Millum annað skuldi málmaðurin hjá Dundee United, Paul Gallagher, spæla sín fyrsta landsdyst fyri Skotland í gjárkvøldið.



# Ein stórur heiður

**Formaðurin í FSF er sera fegin um, at fótbóltslandsliðið kann umboða Føroyar so væl, sum tað ger, og hann roknar eisini við einum góðum úrsliti á vøllinum mikudagin**

TÝSKLAND-FØROYAR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*



*Í FSF er spenningurin undan stóru uppgávuni stórur, og hetta sæst eitt nú aftur í, at VIP'arnir eru heldur fleiri í tali, enn teir plaga at vera*

**HANNOVER:** Tá fótbóltslandsliðið ferðast runt í europa til ymsu altjóða avbjóðingarnar, er tað aloftast so, at eini tvey umboð úr landsliðsnevndini hjá FSF hava verið við á ferðini.

Í so máta er ferðin hesa ferð eitt undantak, tí øll nevndin hjá FSF er nevnliga stødd í Hannover.

Formaðurin í FSF, Dánjal Andreasen, sigur eisini sjálvur um hetta, at hetta er púrasta óvanligt, men at hetta samstundis eisini vísir, hvussu stóra æru FSF setir í júst hendan dystin, sum er tann størsta avbjóðingin, sum føroyska landsliðið nakran tíð hevur fingið.

Spurdur, um teir í nevndini hava gjørt nakað burturúr at seta seg í samband við týsku starvsfelagarnar, sigur Dánjal, at tað høvdu teir sum so ikki. Hinvegin hava teir havt úr at gjørt, tí seinastu tíðina hevur neyvan verið dagur, har ikki okkurt fjølmiðlaumboð hevur spurt seg fyri hjá FSF.

– Her hava verið fólk úr øllum miðlum. Bløð og útvarps- og sjónvarpsstøðir hava stútt og støðugt sett seg í samband við okkum, og fylgt við, hvussu fyrireikingarnar ganga, og tað er púrasta óvanligt hjá okkum. Gaman í hava vit fingið nakað av umrøðu fyrr, men ikki í nær námind tí, sum vit fáa her niðri. Tað hongur so nokk eisini saman við, at vit fingu eitt somikið gott úrslit ímóti Skotlandi.

### Errin av umboðanini

Tað er helst eingin loyna, at fremsta føroyska umboðið, tá landið skal umboðast úteftir, er júst fótbóltslandsliðið, og Dánjal dylur heldur ikki yvir, at hann er errin um, at landsliðið á hendan hátt kann skapa nakað fyri Føroyar.

– Tað er so heilt víst. Sum sagt, so hava mest sum allir miðlar verið í sambandi við okkum og gjørt antin greinar ella innsløg um Føroyar, og sum heild er spenningurin um dystin sera stórur.

Og hóast fólk eru ymisk á málið um, hvussu vónirnar fyri einum góðum úrsliti eru móti Týsklandi, so tykist Dánjal ikki vera serliga smæðin, tá vit at enda spyrja hann, um hann hevur nakað boð uppá, hvat dysturin mikudagin fer at enda.

– Tað verður 3-2 til Týskland. Tað er so mítt boð, og so fáa vit at síggja, hvussu rætt tað er.

## Fylti í bæði Litava og Týsklandi



Formaðurin í FSF, Dánjal Andreasen, helt sín 49 ára føðingardag á landsliðsferðini. Dánjal hevði nevnliga føðingardag sunnudagin, ta´føroyska landsliðið ferðast úr Litava til Týsklands, og so er spurningurin bert, um føðingardagsgávan verður betri í Týsklandi, enn hon var í Litava.

*Dánjal Andreasen*